VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag og leygardagin:
Fleyr til gul av ymsum ættum, leygardagin mest av norði. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.



Veðrið sunnudagin:
Lot til andøvsgul av norði og útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Lot til andøvsgul av norði, týsdagin av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 11 og 15 stig.

www.sosialurin.fo

Ein sensatión

Tríburarnir, sum komu í verðina á Landssjúkrahúsinum mánadagin, fingu mikudagin vitjan av umboðum fyri Tórshavnar býráð

VITJAN
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

Jan Christiansen, borgarstjóri, Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóri og Heðin Mortensen, býráðslimur, stukku mikudagin inn á gólvið á føðideildini at vitja tríburarnar og familjuna hjá teimum

Mynd: Álvur Haraldsen

– Hetta er jú ein lítil sensatión, má man siga, sigur borgarstjórin í Havn, Jan Christiansen, sum mikudagin var á vitjan hjá nýføddu tríburunum.

Vegna Tórshavnar býráð handaði hann foreldrunum Bjørg og Karl Eriki av Argjum ein kekk upp á 10.000 krónur.

Jan sigur, at býráðið hevði ætlanir um at keypa teimum ein serligan vogn til tríburarnar, men tað vísti seg ikki at vera so lætt at fáa fatur á einum.

– Persónliga haldi eg, at tað er serstakliga ópersónligt at geva pengar í slíkum førum, men tá ein vognur ikki var at fáa, so gjørdu vit av at geva pening, so tey sjálvi kunnu keypa eitthvørt, sum teimum manglar til tríburarnar, greiðir borgarstjórin frá.

Langt ímillum

Tað er ikki á hvørjum degi, at tríburar verða føddir í Føroyum. Tí heldur Jan Christiansen so avgjørt, at hetta kann sigast at vera ein lítil sensatión.

– Eg minnist ikki sjálvur, nær seinast tríburar vórðu føddir í Havn. Altso tað vil siga búsitandi í Havn, sigur hann.

Hann nevnir onkur, sum hann minnist, fingu tríburar, men tey fluttu úr Tórshavnar kommunu stutt eftir, og tískil heldur Jan, at tað eru rættuliga, rættuliga langt síðani seinast, at tríburar vórðu føddir í Havn.

Seinast, Tórshavnar býráð heiðraði einum nýføðingi, var, tá borgari nummar 18.000 varð føddur, og samanber borgarstjórin hesa stóru hendingina við tað.

Á kekkinum, sum er undirskrivaður av borgarstjóranum og trivnaðarstjóranum, Gunnleyg Durhuus, verður ynskt foreldrunum til lukku við tríburunum og alt tað besta framyvir.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	6
Nuuk	5
Qaqortoq	8
Ammassalik	7
Saint John's	–
Halifax	–
Reykjavík	9
Seyðisfjørður	12
Tórshavn	10
Lerwick	11
Aberdeen	13
London	21
Tromsø	14
Bergen	11
Oslo	–
Stokkhólm	15
Keypmannah.	14
Helsinki	16
Moskva	20
Berlin	17
Warzawa	20
Kiev	21
Bukarest	25
Paris	24
Madrid	29
Róm	30
Malorca	-
Athen	32
Malta	30
Tunis	30
Beijing	31
New Dehli	35
Bangkok	34
Jakarta	30
Sydney	15
New York	26
Miami	31
Los Angeles	20
Meksikobýur	21
Panama	–
La Paz	8
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	20

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt hátrýst, 1023 hPa. vestan fyri Írland fer spakuliga í landsynning, men ein hátrýstryggur til Norðhavið verður yvir Føroyum teir fyrstu dagranar.



Hátrýstið yvir Føroyum viknar spakuliga. Lágtrýstið yvir Suður-Skandinavia stendur mestsum í stað og gevur høgætt um vikiskifti.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 07/07 kl. 06⁰⁰-08/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,5°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 4,5 mm –mált frá 07/07 kl. 06⁰⁰-08/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 24,0 mm

Vika 28 – 7. juli
Vinnaratøl: **1 - 7 - 9 - 33 - 35 - 42**

Eykatøl: **19 - 47**

6 vinnaratøl:	**0,- kr.**
5 vinnarat.+ eykatal:	**48.726,- kr.**
5 vinnaratøl	**3.526,- kr.**
4 vinnaratøl:	**117,- kr.**
3 vinnaratøl:	**37,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

VESTFALLSKYRRINDI

1. juli: Mánin næstur jørðini
5. juli: Jørðin longst frá sólini
9. juli: Seinna kvarter
14. juli: Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2004

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
9. juli	01.01	13.36	00.01	12.36	00.16	12.51	03.01	15.36	04.01	16.36	11.51	—	10.51	23.25	01.16	13.51	02.16	14.51	00.46	13.21	02.01	14.36
10. juli	02.10	14.44	01.10	13.44	01.25	13.59	04.10	16.44	05.10	17.44	00.25	12.59	11.59	—	02.25	14.59	03.25	15.59	01.55	14.29	03.10	15.44
11. juli	03.05	15.26	02.05	14.26	02.20	14.41	05.05	17.26	06.05	18.26	01.20	13.41	00.20	12.41	03.20	15.41	04.20	16.41	02.50	15.11	04.05	16.26
12. juli	03.47	16.09	02.47	15.09	03.02	15.24	05.47	18.09	06.47	19.09	02.02	14.24	01.02	13.24	04.02	16.24	05.02	17.24	03.32	15.54	04.47	17.09

5 707265 100029 >